# Ferðslukaos í hálkuni

**Ein rúgva av smáum ferðsluóhappum vóru kring landið, tá ið kavin legðist fyrr í vikuni. Fólk koyra ikki eftir umstøðunum, heldur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn**

FERÐSLUÓHAPP
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ein ørgrynna av ferðsluóhappum hava verið kring landið, nú kavin legðist, og tað varð sera hált.

Tað byrjaði í Klaksvík mánamorgunin, har kavin kom eitt sindur fyrri enn aðrastaðni, og tvey smærri ferðsluóhapp vóru fyrrapartin mánadagin.

Seinnapartin kom kavin eisini til høvuðsstaðarøkið, og tað sást eisini aftur. Seinnapartin vóru fleiri smærri ferðsluóhapp í Havn. Í eina førinum fekk ein bilførari snudd í ryggin og nakkan, men kundi fara sjálvur á Landssjúkrahúsið til kanningar. Á Strondum var eitt minni óhapp.

## Fleiri bilar í óhappi

Í Kaldbaksbotni fóru ein bilur út av vegnum.

Tá ið løgreglan kom til hetta óhappið um fimmtíðina mánadagin, sóu teir ein annan bil fara út av vegnum afturat.

Bilførarin kom úr bilinum og fekk steðga einum øðrum bili, har hann kundi kroka í tí ringa veðrinum.

Óhappið vildi tað bara soleiðis, at hesin bilurin, sum varð steðgaður av tí óhepna bilføraranum, varð árendur av einum øðrum bili.

– Óhappini koma oftast, tá ið kavin legst, og bilførarar ikki koyra eftir umstøðunum, sigiur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn.

## Óhapp í tunli

Um hálvgum fimm tíðina týsdagin rendi ein bilur inn í veggin í Kollfjarðabergholinum, og eina lítla løtu seinni rendi ein annar bilur á hendan bilin. Tað gekk ein lítil løta, og so var ein triði bilur komin upp í óhappið.

Hetta fekk løgregluna at biða Útvarpið heita á bilførarar um ikki at koyra inn í bergholið. Hendan fráboðan var tikin aftur um 5-tíðina, tá ið løgreglan var komin á staðið og hevði fingið tamarhald á støðuni.

## Týsdagin vóru eisini

Týsdagin vóru eisini fleiri ferðsluóhapp í hálkuni. Týsmorgunin boðaði ein bileigari í Havn løgregluni frá, at hansara bilur var árendur, men at eingin hevði boðað honum frá óhappinum.

Á brúnni um Sandá rendu tveir bilar saman, men eingin fólkaskaði var av tí. Ein bilur fór út av vegnum við Landsverk í Kollafirði, og á Norðskála vóru tvey óhapp, har bilar fór út av í hálkuni.

Um midnáttarleitið týskvøldið var eitt óhapp afturat í høvuðsstaðnum, og í Syðrugøtu koyrdi ein bilførari út av vegnum mikunáttina. Hesin koyrdi við kenning, heldur løgreglan.

Mikumorgunin var eitt minni óhapp á Tvøroyri.

# Vognur koppaði í vindinum

**Veðrið var av tí ringasta í Norðragøtu týskvøldið, og ein viðfestisvognur koppaði í nógva vindinum**

ILLVEÐUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin*

Tað var nógvur vindur og ein keðiligt ætt í Norðragøtu týskvøldið. Kavastormurin hótti ferðsluna, og tað var friðarligt við bilum hetta kvøldið. Fólk vágaðu sær ikki út í tí ringa illveðrinum.

Á keiini innanfyri Fiskavirkið fór vindurin við einum stórum viðfestisvogni, og hesin koppaði, hóast hann vigar nógv tons.

Sambært veðurmonnunum hevur ringasta kavaveðrið verið í vikuni. Hósdagin verður lýggjari veður aftur, og teir rokna við, at tað eisini fer at regna.



*Hesin viðfestisvognurin koppaði í nógva vindinum í Gøtu týskvøldið*

# Høgni Lisberg ger fløgu lidna í Belgia



*Høgni Lisberg hevur roynt at ført seg fram uttanlands, og higartil hevur tað givið møguleikan at spæla á konsertum, og hann hevur eisini fingið ummæli av sínari fyrstu fløgu*

**Høgni Lisberg hevur tikið tónleikin til nýggja fløgu upp í Danmark, hann ljóðblandar nú tónleikin í Belgia og vónar, at fløgan kann verða givin út uttanfyri landoddarnar**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Føroyski tónleikarin Høgni Lisberg, sum var trummuspælari, men sum tók stigið inn á tónleikapallin sum sangari, sangskrivari og gittarspælari, er nú í holt við sína aðru fløgu.

Fyrsta fløgan hjá honum, »Most Beautiful Things«, kom út beint fyri jól í 2003, og hon hevur verið væl móttikin. Høgni Lisberg hevur roynt at ført seg fram uttanlands, og fløgan hevur fingið góð ummæli ymsastaðni. Høgni hevur eisini havt konsertir uttanlands – eitt nú í Sveis – og tað hevur rættiliga givið blóð á tonna.

## Sveisisk hjálp

Tónleikarin úr Leirvík er nú farin í holt við sína næstu fløgu, og hesaferð verður ikki tikið upp á nøkrum kamari ella í nøkrum bygdarhúsi í Føroyum.

Upptøkurnar eru gjørdar í Lundgaard Studios í Danmark, sum er eitt kent studio, og nú verður tónleikurin ljóðblandaður í Belgia.

Ætlanin er, at tónleikurin skal verða liðugur og klárur at geva út miðskeiðis í hesum mánaðinum, og fløgan skal so koma út í vár.

Høgni Lisberg arbeiðir miðvíst fyri,at fløgan kann verða givin út uttanfyri føroysku landoddarnar, og arbeitt verður millum annað saman við fólki úr Sveis, sum Høgni hevur samband við.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!